Dansifrøi framsýning á Torginum

TÍÐINDASKRIV

Í samband við 30 ára stovningardagin hjá Dansifrøi 25. januar,verður stórt tiltak á Torginum í SMS leygardagin 19. januar.

25. januar kann dansifelagið Dansifrøi halda sín 30 ára stovningardag. Hetta verður eisini hildið við einum braki. Tí longu leygardagin 19. januar verður

Torgið í SMS karmur um stórt føðingardagstiltak við mynda- og dansiframsýning og stórari tombolasølu.

Á myndaframsýning verða sýndar fram myndir úr 30 ára longu søgu felagsins.

Myndirnar, sum ikki eru sýndar fram áður, eru umleið 400 í tali. Leygardagin kl. 11.00 og kl. 13.00 er møguligt hjá vitjandi í SMS, at síggja dans á Torginum. Tá fara limir úr Dansifrøi nevnliga at hava dansiframsýning.

Umframt hetta skipar Dansifrøi fyri tombolasøla, við alskyns vinningum.

Tiltakið á Torginum í SMS letur upp leygardagin kl. 09.00. Opið er til kl.14.00. Myndaframsýningin hongur tó uppi til friggjadagin 25. januar.

Vit síggjast í SMS!

Master útbúgving í leiðslu og fyrisiting

BP hevur gjørt av at stuðla einari Master útbúgving í samstarvi við Robert Gordon Universitetið í Aberdeen og Føroya Handilsskúla. Útbúgvingin verður skipað sum parttiðarundervísing og fjarlestur. Tann lesandi kann nema sær eina fullliggjaða Master útbúgving, sama hvar hann býr. Sostatt hava fólk í útjaðaraøkjunum somu møguleikar at luttaka, sum tey, ið búgva í miðstaðarøkinum.

Undirvist verður um internetið. Tá ið útbúgvingin byrjar, verður skipað fyri felags kunning, og bólkafundum í tveir dagar í hvørji lærugrein.

Útbúgvingin er býtt upp í trý eitt árs skeið. Hvørt árið gevur endaligt prógv, og er tað upp til tann lesandi, um hann heldur áfram øll trý árini.

	Lærugreinir:	Heitl, eftir lokna prøvtøku:
1. árið:	The Business Environment, Managing People, Finance for Managers, Marketing	-Post Graduate Certificate
2. árið:	Human Resource Management, Planning and Decision Making Economics of Business, eBusiness Systems	-Post Graduate Diploma
3. árið:	Høvuðsritgerð	-Master Degree

Umsøkjarin skal hava lisið í trý ár á universiteti ella liknandi hægri lestrarstovni.

Útbúgving sum fólkaskúlalærari, skipsførari, maskinmeistari og frá hægri handilsskúla o.l. útbúgvingar, kunnu eisini geva atgongd til upptøku. Eisini kunnu drúgvar førleikagevandi arbeiðsroyndir geva rætt til upptøku.

Kunnandi fundur verður mánadagin 4. februar 2002 kl. 16:00, á Føroya Handilsskúla í Havn. Umboð frá Robert Gordon Universitetinum í Aberdeen luttaka.

Útbúgvingin byrjar 4. mars 2002.

Umsóknarfreistin er mánadagin 11. februar 2002. Umsóknarblað fáast við at venda sær til Føroya Handilsskúla.

Áhugað eru vælkomin at seta seg í samband við Elsu Mariu Holm Olsen, deildarstjóra á Føroya Handilsskúla á Kambsdali, tel. 444900 ella við teldupost: elol@kambsdal.olivant.fo, at frætta nærri um útbúgvingina.

THE ROBERT GORDON UNIVERSITY ABERDEEN

FØROYA HANDILSSKÚLI

bp

Karsten Hansen afturkomin av almennari vitjan í Íslandi

Landsstýrismaðurin við fíggjarmálum, Karsten Hansen, kom hósdagin heim aftur til Føroya av almennari vitjan í Íslandi, har hann var gestur hjá íslendska fíggjarmálaráðharranum, Geir H. Haarde.

ÍSLANDSVITJAN
Eirikur Lindenskov

Í Íslandi var ein fundur millum starvsbrøðurnar, har evnið var samstarvið millum Ísland og Føroyar á búskapar-, fíggjar-, skatta- og avgjaldsøkinum.

– Greitt varð frá gongdini í búskapunum í londunum báðum og frá fíggjarpolitiskum tiltøkum, ið eru framd og eru í umbúna. Avtalað varð eisini at halda fram við samstarvinum um tollautomatisering, eins og avtalað varð at fáa í lag arbeiði at gera nærri samanberingar av føroysku og íslendsku búskapunum, sigur Karsten Hansen.

Hann situr eisini, at aftan á fundin varð ein tíðindafundur hildin.

– Og ikki óvæntað vóru íslendsku fjølmiðlarnir serliga áhugaðir í gongdini í fullveldismálinum og oljuvinnuni.

Á vitjanini vórðu eisini stundir til at leggja leiðina framvið Gullfoss og Geysir, og vitjað varð eisini á íslendsku stórfyritøkunum Marel og DeCode. Fyrstnevnda fyritøka framleiðir framkomna fiskivinnuútgerð til fiskaídnaðin kring knøttin, eisini í Føroyum, og DeCode er ikki minni kend fyritøka einamest fyri sína gransking innan arvaligar sjúkur.

Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu, tá okkara høgt elskaða kona, mamma, vermamma, omma og langomma

Óluva Jóhanna Hansen,
Tórshavn

so brádliga varð kallað heim til Harran.

Tøkk til tykkum øll í Evangeliihúsinum fyri ta hjálp, tit sýndu okkum í stóru sorg okkara.

Tøkk til tann stóra skara, ið fylgdi henni til hennara seinasta hvíldarstað.

Tøkk fyri blómur og kransar.

Familjunnar vegna
Poul Anker Hansen

Navnið varð Kurl@

Fyrrapartin í gjár varð navnið á nýggja barnagarðinum hjá Føroya Tele avdúkað í sambandi við, at stovnurin verður tikin í brúk fyrst í næstu viku. Navnið, barnagarðurin fekk, varð Kurl@, sum jú er nýggja orðið fyri tað, ið annars hevur verið kallað snápul-a

BARNAGARÐUR
Ingrid Bjarnastein

Saman við pápanum hjálpti 13 mánaðar gamli Bartal til at avdúka navnið á dagstovninum hjá Føroya Tele. Dagstovnurin fekk navnið Kurl@

Mynd: Jens Kr. Vang

Nógv fólk varð komið saman í nýggja barnagarðin við Sundsvegin í Havn fyrrapartin í gjár.

Fyrst var tað Jens Wang, projektleiðari, ið bjóðaði vælkomin, og serliga til børnini, tí barnagarðurin er jú teirra.

– Vit kunnu gleðast um tað, sum fyri nærum tveimum árum síðani byrjaði sum eitt kaffiprát, nú er veruleiki, og hetta er ein søguligur dagur í søguni hjá ikki bara Føroya Tele, men yvirhøvur. Hetta er fyrstu ferð eitt partafelag hevur stovnað egnan barnagarð, og eru vit ógvuliga glað og eisini stolt um nýggja stovnin, segði Jens Wang millum annað.

Andras Róin, stjóri í Føroya Tele, Jan Christiansen, borgarstjóri og Heðin Mortensen, sum situr í Mentamálanevndini í býráðnum søgdu eisini nøkur orð og felags fyri teir allar var, at teir fegnaðust um góða samstarvi millum Føroya Tele og kommununa, og at barnagarðurin nú endiliga var liðugur.

Bartal fingið pláss

13 mánaðar gamli Bartal var eisini til samkomuna í gjár saman við foreldrunum Jan Petersen og Tórun Skaalum Petersen. Bartal var tann, sum saman við pápanum fekk heiðurin at taka løriftið av skeltinum har navnið á nýggja barnagarðinum stóð.

– Vit eru ógvuliga glað fyri hetta, siga foreldrini hjá Bartal. – Hetta er avgjørt ein fyrimunur, tí annars hevði Bartal ikki fingið pláss fyrr enn í 2003, men av tí, at Jan arbeiðir hjá Føroya Tele, fingu vit so pláss her.

»Kært barn...

... har mange navne« verður sagt. Og nógv nøvn høvdu eisini verið uppi og vent í sambandi við, at navn skuldi finnast til stovnin.

Ein kapping var útskrivað millum starvsfólkið hjá Føroya Tele og starvsfólkið á stovninum, og nógv uppskot komu fram, sum vóru bæði uppfinnsom og skemtilig.

Men tað varð stovnsleiðarin, Durita Dam, ið saman við manninum hevur funnið fram til tað, ið barnagarðurin skal eita – nevnliga Kurl@. Onnur nøvn, sum annars eisini høvdu verið uppi og vent vóru til dømis »Støðin«, barn.fo, Tórslætti og Andrassarstova eftir Andrasi Róin, stjóranum á Føroya Tele.

Tó varð tað ein samd navnanevnd, ið helt, at dagstovnurin skuldi eita Kurl@. Føroya Tele er jú ein stovnur, ið fæst við samskifti, er kurlan jú eitt av teimum teknunum, ið verður brúkt mest av, tá talan er um samskifti. Eisini helt navnanevndin, at hetta var eitt ógvuliga fitt navn, sum angar av framtíð, og børnini eru jú framtíðin. Dagstovnurin ynskir eisini at menna og røkja føroyska málið og hildið varð, at hetta orðið eisini er við at menna og røkja málið.

Eitt skeltið varð gjørt at hanga upp. Kurl varð skrivað við grønum, meðan @´ið var skrivað við reyðum. Hesir litirnir hava eisini súmbolskan týdning. Grøni liturin er fyri náttúruna, meðan tann reyði heiti liturin er sami litur, sum í búmerkinum hjá Føroya Tele.

Dagstovnurin letur upp í næstu viku við 23 børnum í fyrsta umfarið. Pláss er annars fyri 34 børnum.

Sosialurin ynskir Føroya Tele og Tórshavnar Býráð hjartaliga tillukku við nýggja dagstovninum.